## Øði um bankaleka

Fleiri fyritøkur í Danmark eru í øðini um, at teirra samskifti við íslendska Kaupting-bankan er almannakunngjørt, eftir at onkur hevur lagt viðskiftabókina hjá bankanum út á alnótina. Sambært Børsen standa 61 danskar fyritøkur í viðskiftabókini, og teirra millum eru nakrar av landsins størstu so sum A.P. Møller-Mærsk, Carlsberg, Dong, TDC, Arla og Danfoss. Tær hava lænt tilsamans 45 milliardir krónur frá FIH Erhvervsbank, sum Kaupting eigur. Niels B. Christensen, sum er stjóri í Danfoss, sigur við Børsen, at hann er skelkaður av, at viðskiftabókin er almannakunngjørd. Tað er heilt óvanligt og ólógligt, sigur hann.

## Eykajáttan til SL

Gongur tað, sum landsstýrismaðurin í samferðslumálum ætlar, fer Ternan at sigla millum Havnina og Nólsoy frá 1. oktober, og samstundis fer Ritan at sigla út til Svínoyar og Fugloyar. Jóhan Dahl segði undir orðaskiftinum í løgmansrøðuna í gjár, at vinnumálaráðið hevur latið fíggjarmálaráðnum eina umbøn um at fáa ta neyðugu játtanina til broytingina á eykajáttanarlóg fyri september. Landsstýrismaðurin upplýsti samstundis, at hansara mál er at fara undir at byggja eitt nýtt nólsoyarskip burtur av teimum 100 milliónum krónunum, sum sambært ólavsøkupakkanum skulu brúkast til skipabygging.



*Hans Atli Dahl, sum er mýlfrøðingur, heldur tað vera løgið, at føroysku myndugleikarnir ikki nú hava spurt seg fyri hjá fyritøku hansara Amplexia Genetics, tí fyritøkan hevur gjørt fleiri kanningar av føroyingum og liggur tí inni við nógvum upplýsingum*



# Lætt og bíligt at kanna fyri CTD

**Tað hevði verið skjótt at funnið og kannað føroyingar fyri CTD fyri eina rímiliga upphædd, sigur Hans Atli Dahl, mýl-lívfrøðingur, ið hevur sína egnu kanningarfyritøku í Danmark**

CTD
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Føroyskir myndugleikar kanna í løtuni, hvussu umfatandi farast skal til verka fyri at finna einar 20 ungar føroyingar, sum eru sjúkir av CTD, men ikki vita av tí.

Danska heilsustýrið hevur sent føroyskum myndugleikum eitt tilmæli til støðutakan. Tað sama hevur týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, sum hevur havt føroyskar sjúklingar undir hond í mong ár og má metast at vera ein hin fremsti serfrøðingurin á økinum í heiminum.

Av tí, at torført er at finna eina loysn, fer danska heilsustýrið møguliga at skera ígjøgnum, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni við Sosialin.

Hann sigur semju vera um, at øll, sum eru fødd eftir 1986 verða kannað við biokemiskari skreening. Spurningur er, hvusu víða skal farast við at kanna teirra skyldfólk.

### Pengar stýra

Málið snýr seg í stóran mun um pengar, tí kanningarnar eru sera kostnaðarmiklar. At kanna innihaldið av carnitine í blóði kostar, sambært Ulriku Steuerwald, 2.500 kr., meðan genkanning á Ríkissjúkrahúsinum kostar einar 3.500 kr.. Men er hetta besta loysnin?

Í Odense í Danmark býr føroyski mýl-lívfrøðingurin Hans Atli Dahl, sum rekur kanningarstovunaAmplexia Genetics a/s.

Hann hevur gjørt genkanningar av fleiri enn 100 føroyingum og veit nógv um útbreiðsluna av arvaligum sjúkum í Føroyum.

### Kann gerast bíligari

Hann heldur tað vera løgið, at heilsumyndugleikarnir ikki hava vent sær til fyritøku hansara Amplexia og spurt um teirra meining.

– Tað undrar meg ikki sørt, at tað bara verður tosað um at gera biokemiskar skreeningar av blóðinum heldur enn genkanningar, tí genroyndin er nógv meira álítandi, sigur Hans Atli Dahl, sum ikki krógvar, at hansara úttalilsi kunnu tykjast litað, við tað, at hann hevur sína serútbúgving og sína kanningarstovu. Eingin orsøk er heldur til bara at kanna tey, sum fødd eru eftir 1986, tí álítandi DNA-kanningar kunnu gerast av teimum, sum eru fødd fyri 1986.

Hans Atli Dahl sigur, at genkanningin er nógv meira álítandi, tí tølini í biokemiskum skreeningum verða ávirkað av fleiri faktorum, eitt nú, um persónurin hevur etið heilivág, hvat viðkomandi hevur etið frammanundan kanningina, um viðkomandi hevur fastað ella annað.

– Við at gera genkanningina er ongin ivi. Antin eru fólkini sjúk ella berarar ella eru tey tað ikki, sigur Hans Atli Dahl, sum hevur gjørt genkanningar fyri føroyska heilsuverkið síðan 2008. Tilsamans av umleið 100 føroyingum og ikki bara fyri CTD.

- Royndirnar verða sendar okkum í bylgjum, men tær koma ein og ein, og tá taka vit 500 krónur fyri hvørja roynd at kanna. Høvdu royndirnar verið skipaðar betri, so vit fingu fleiri í senn, kundu vit gjørt tær væl bíligari, sigur Hans Atli Dahl.

Tí heldur hann tað ikki vera rætt at siga, at tað er so ovurhonds kostnaðarmikið at kanna alt fólkið. Fyritøka hansara er als ikki spurd.

Men tað er neyvan neyðugt, tí heilsumyndugleikarnir vita á leið, í hvørjum familjum sjúkan er, og hvar berarar eru at finna. Tað er lætt at finna øll fólkini, tá fólkatalið er so lítið.

– Og við at kanna tær familjurnar og viðgjørt tey sjúku, høvdu tey fólkini fingið eina lívstrygging.

– Ikki er neyðugt at kanna allar føroyingar. Um valt verður at skreena t.d. abbar og ommur, ber til at siga, hvørjum familjum farast skal eftir. Gen-feilurin arvast, og eru omman og abbin ikki berarar, er eingin orsøk til at kanna restina av familjuni. Vit kunnu tekna familjutrø, og vit hava eitt Ílegusavn, sum júst hevur til uppgávu at gera hesar familjugreiningar. Hví ikki brúka hesa vitan, tí so spara vit nógv, og vit kunnu barja lívi, sigur Hans Atli Dahl.

### Granska aftur í tíðina

Í granskingarhøpi kundi eisini verið áhugavert at kanna longur aftur, bara til abbar og ommur hjá teimum nú ungu, fyri at funnið fram til, nær genbroytingin kann vera hend, ella kanska hvussu sjúkan er komin til landið.

Einki land í heiminum hevur so stóran títtleika av CTD sum Føroyar, og tað kemur av inngiftu. Fara vit fimm ættarlið aftur í tíðina, eru øll meira ella minni skyld við hvørt annað. Av tí sama eru nógvir berarar, og møguleikin fyri at tveir berarar fáa børn er størri